Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bill Justinussen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Vitjanir á sjúkrahúsunum

Spurningar:

1. Er tað framvegis galdandi, at bert koppsettir borgarar kunnu vitja sjúklingar á sjúkrahúsunum?

2. Hvør er orsøkin til, at ikki koppsettir borgarar sambært skrivinum frá 13. juli ikki sleppa at vitja síni kæru á sjúkrahúsunum?

3. Hvør er munurin á einum koppsettum persóni og einum ikki koppsettum persóni, um báðir hava eina galdandi negativa koronukanning?

4. Hvørja heimild hevur sjúkrahúsleiðslan at gera mun millum koppsettar borgarar og ikki koppsettar borgarar?

5. Tekur landsstýrismaðurin undir við hesum mismuni millum føroyskar skattaborgarar?

6. Fer landsstýrismaðurin at broyta treytirnar fyri, hvør kann vitja síni kæru á sjúkrahúsunum?

Viðmerkingar:
13. juli 2021 var soljóðandi skriv at lesa á heimasíðu Landssjúkrahúsins:

“Smittustøðan í Føroyum í løtuni hevur við sær, at avvarðandi eru varin við at vitja innlagdar sjúklingar á sjúkrahúsinum.

Koppsettir borgarar kunnu framhaldandi vitja sjúklingar. Tó eiga koppsettir borgarar, sum hava verið uttanlands, at bíða eftir úrslitinum frá koronukanningini heimkomudagin, innan vitjað verður á sjúkrahúsinum.

Samstundis verður mint á almennu tilmælini um frástøðu og at spritta hendur, meðan vitjað verður.”

Tað hevur alla tíðina verið almenni politikkur samgongunnar, at ikki skal gerast munur á koppsettum og ikki koppsettum í landi okkara. Skrivið frá 13. juli ger álvarsligan mun á borgarum í Føroyum, hóast allir gjalda sama skatt til somu

tænastur. Landsstýrismaðurin verður biðin um at grundgeva fyri, hví ikki koppsett verða soleiðis viðfarin av okkara sjúkrahúsverki, og hví slíkur munur verður gjørdur.

Á Løgtingi, 2. august 2021

Bill Justinussen